## Codfarmers stórt hall

Norska toskaalifelagið Codfarmers hevði eitt vánaligt ár í fjør. Roknskapurin vísir, at felagið hevði 136 milliónir norskar krónur í halli. Av hesum stavaðu næstan 50 milliónir krónur frá rakstrinum í seinasta ársfjórðinginum. Umsetningurin hjá Codfarmers vaks úr 47 í 74 milliónir norskar krónur frá 2007 til 2008, men trupulleikin er, at hallið vaks nógv meiri - úr 28 í 136 milliónir norskar krónur. Prísurin á toski hevur verið lágur í vetur, og sambært norska útflutningsráðnum hevur prísurin fyri aldan tosk verið niðri á 16 norskum krónum fyri kilo.

## Ala tosk inni við land

Í íslendsku bygdini Súðavík, sum føroyingar munnu kenna frá tí stóra skalvalopinum á sinni, verður nú arbeitt við einari ætlan at ala tosk í ringum, sum skulu vera landfastir. Umframt sjálva alingina er ætlanin at brúka støðina til ymsar rannsóknir og at knýta hana at teirri lokalu ferðavinnuni. Í løtuni verður arbeitt við at kanna, hvat verkætlanin fer at kosta, og hvussu hon skal fíggjast. Tað úrslitið skal ætlandi verða tøkt um einar tríggjar mánaðir. Fyribils skulu einar 900.000 íslendksar krónur brúkast til neyðugar kanningar.

# Megna at nøkta tørvin

**Lívfiskastøðin í Skopun hevur enn sum áður sín stóra týdning í føroyskari aling, sjálvt um kynsbótaarbeiðið helt upp at í 2004. Laksur og síl verða ald á støðini fram til tey gýta, og kapasiteturin er nóg stórur til at nøkta tørvin í Føroyum**



*Edmund Nielsen er annar av tveimum, við ábyrgd av fiskinum, sum svimur á Lívfiskastøðini í Skopun. Hann hevur starvast har í útvið 14 ár, ella næstan síðani støðin læt upp*



*Við tangabilunin var eisini alifóður til fiskin á støðini*



*Eina ella tvær ferðir um árið fær Lívfiskastøðin í Skopun nýggjan laks. Hann er tá um 100 gramm*

ALING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tá Lívfiskastøðin í sínari tíð varð bygd, var hetta við tveimum endamálum í hyggju: Annað var at byrja kynbótaarbeiði í sambandi við síl og serliga laks, hitt var ein liður í einari bygdamenningsætlan, sum upptók politikarar nógv eftir kreppuna fyrst í 90-árunum.

Ein av teimum, sum hevur verið við so at siga frá byrjan, er Edmund Nielsen.

- Vit ala laks fram til hann er klárur at gýta, sigur Edmund Nielsen um arbeiðið á Lívfiskastøðini.

Tað er Fiskaaling við Áir, sum letur fiskin til Lívfiskastøðina í Skopun. Hann vigar tá um 100 gramm ella so.

– Vit hava tríggjar árgangir gangandi her á Lívfiskastøðini, meðan tann ynskti árgangurin er við Áir. Laksurin er eitt ár eldri enn hann er úti á sjónum, tá hann verður slaktaður. Og tað verður hann, tá rognini verða tikin, og tí mugu vit hava 4 árgangir Edmund Nielsen.

Lívfiskastøðin hevur eisini síl gangandi.

– Tað hava vit havt seinastu fýra til fimm árini. Talan er um tann gamla sílastovnin í Føroyum. Nakað av tí gekk norðuri í Skálabotni, og tað hava vit so havt inni nú, og tað er tann gamli sílastovnurin frá 1965, sigur Edmund Nielsen.

### Sjúka í Noregi

Tá Lívfiskastøðin í sínari tíð læt upp, var ein stórur partur av arbeiðinum kynbótaarbeiði, men tað steðgaði fyri einum fimm árum síðani.

– Eg dugi ikki reiðiliga at siga, hví tað arbeiðið steðgaði, um tað kunnu hava verið fíggjarligar orsøkir, men eg veit tað ikki. Vit hava tó framvegis skil á øllum laksafamiljunum, og hava allar árgangirnar intaktar sigur Edmund Nielsen.

Hann heldur, at kynbótaarbeiðið steðgaði eftir at loyvið varð givið til at flyta rogn inn til Føroyar, so alararnir frítt kundu keypa har, teir vildu sjálvir.

– Tað er allarhelst óheppi at flyta rogn inn í fleng, tí tað er ikki til at siga, hvørjar sjúkur og annað, vit kunnu flyta inn í landið við hesum. Vandin er í hvussu er stórur, sigur Edmund Nielsen.

Og júst hetta at selja rogn til alarar er høvuðsuppgávan hjá Lívfiskastøðini.

– Vit selja rogn til alararnar, men av tí at tað stendur øllum frítt at keypa rogn allastaðni, har tú vil, so vita vit ongantíð, um vit eru keyptir ella seldir við tí, sum vit framleiða, og tað hevur gjørt tað rættiliga trupult, sigur Edmund Nielsen.

Hendan óvissan hevur gjørt, at teir ikki hava klárað at selt alt tað, teir hava framleitt seinastu árini, men fyri árið í ár er ógvuliga nógv selt – um ikki alt – og tað kemst av tí, at tað er uppstaðin ein nýggj sjúka í Noregi.

– Eg kenni ikki tekniska navnið á sjúkuni, men eg havi lisið í alibløðum, hvussu óførir norðmenn halda okkum føroyingar vera, at vit standa saman um ikki at keypa rogn frá Noregi beint nú, tí teir dragast við hesa sjúkuna, sigur Edmund Nielsen.

Orsakað av hesum keypa føroyskir alarar nú meiri frá Lívfiskastøðini.

– Men logikkurin er eitt sindur løgin í tí, av tí at roknast kann við, at tá sjúkan er bast, fara vit aftur at keypa rogn frá øðrum, sigur Edmund Nielsen.

Hann heldur, at skulu vit hava ein støð sum hana í Skopun, er neyðugt at vit trúgva upp á hana, og taka kynbótaarbeiðið upp aftur, um tað er tað rætta.

### Rognini tikin við Áir

Edmund Nielsen sigur, at Lívfiskastøðin í Skopun lættliga kann nøkta allan tann tørv sum er á laksarognum í Føroyum.

– Sjálvandi ber ikki til at verja seg um óhapp koma inn í myndina sum ger, at arbeiðið forferst onkusvegna, men undir øllum vanligum umstøðum er eingin trupulleiki at nøkta